


REPROZ

# FOSTURFORELDUR

Í sambandi við at nýggja barnaverndarlógin kemur í gildi tann 1. jan. 2006, verður søkt eftir fosturfamiljum kring alt landið.

Vit søkja bæði eftir fosturfamiljum, ið kunnu hava børn til umlætting og fosturfamiljum, sum kunnu vera bráðfeingis fosturheim, fyribils fosturheim og varandi fosturheim.

FØRLEIKAKRØV

Fyri at kunna góðkennast sum fosturforeldur krevst:

- Rein revsiváttan
- Læknaváttan um heilsustøðu
- Góðar bústaðarumstøður
- Fíggjarligu viðurskiftini eru í lagi
- Neyðug umsorganarevni og foreldraførleiki
- Møguligar royndir sum uppalarar

SETANARVIÐURSKIFTI

Avtala verður gjørd við Barnaverndarstovu Føroya og avvarandi Barnaverndarnevnd um:

- Tíðarætlan
- Samsýning
- Samverurættin hjá foreldrum og øðrum
- Stuðul, vegleiðing og luttøku í undirvísing

Samsýningin verður sambært kunngerð nr. 3 frá 3. mars 2004 frá Almanna- og Heilsumálaráðnum um samsýning til fosturforeldur.

UMSÓKN

Umsókn saman við reinari revsiváttan, læknaváttan um heilsustøðu og avrit av prógvum verður at senda til:

Barnaverndarstovu Føroya
R.C. Effersøesgøta 30
FO-100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 28. februar 2006

# Skeið í Ayur Veda



Nær? Leygardagin 28. jan. 2006 frá kl. 9.00 - 16.00

Hvar? á Hotel Føroyum

Hvat kostar? 1200,- f. hv., íroknað evnismappu, vegetardøgurða og 2x kaffi/te

Melda til? gongini@post.olivant.fo ella 312064/ 212064

Gjalda? á kt. í Fø. Banka 2006326

TEAM85



*Ayur Veda merkir "vitan um lívið" og er ein fullkomin heilsuskipan bygd á grundreglurnar í náttúruni. Terapiirnar í Ayur Veda umfata m.a. kostin.*

*Í Ayur Veda læruni verður støðið tikið út frá trimum orkum, sum eru í kroppinum: Vata, Pitta og Kapha. Okkara kroppur hevur allar tríggjar orkur, men ofta er ein teirra tann dominerandi. Út frá tí verður avgjørt, hvør týpa tú ert, og tú fært góð ráð og vegleiðing um, hvussu tú skalt liva fyri at halda kroppin í javnvág.*

*Tú kanst lesa meira um Ayur Veda á: www.netnaturdoktoren.dk/om_ayurveda1.htm*

# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI · TEKNISKI SKÚLIN



## Dugir tú at samskifta?

**Øll hava fyri neyðini at duga væl at samskifta bæði skrivliga og munnliga. Her er skeiðið, sum rykkir ullina úr munninum og vendir stílaskrivingini á høvdið.**

Munagott samskifti kann eingin vera fyri uttan. Tey, sum kortini kunnu, munnu pella.

Bølir tú uppi yvir skrivligum uppgávum? Fært tú ikki boðskapin ordiliga fram í brøvum? Gerast teldupostarnir ov drúgvir? Taka teir ov langa tíð? Og hvussu er, tá tú skalt reisa teg og siga nøkur orð í einari mannfjøld? Firvaldar í búkinum? Dettur tann svarti "klappurin" niður fyri eyguni?

Uppskriftin, sum mangan hjálpir er henda: Set tær eitt mál, fá boðskapin fram og ger hampiliga stutt av. Og so tað mest neyðuga: Tú skalt tora at tora.

Á samskiftisskeiðnum fæst innlit í, hvat samskifti er, og dentur verður lagdur á munagott samskifti, har boðskapurin og móttakarin eru í miðdeplinum. Tú hevur kjansin at broyta tín skrivihátt, og tá skeiðið er liðugt, dugir tú rímiliga væl at bera tíni sjónarmið fram munnliga.

Vit røkka málinum við skrivligum venjingum, dømum úr gerandisdegnum og við at festa framløgur okkara á sjónband og greina tær í felag.

Hetta er skeiðið, sum rykkir ullina úr munninum og vendir stílaskrivingini á høvdið.

**Per Højgaard er skeiðleiðari.** Hann er útbúgvin journalistur við drúgvum royndum innan skrivligt og munnligt samskifti.

**Kostnaður:** 5.800,-
**Tíð:** 13. og 14. februar 2006, kl. 9-16
**Tilmelding:** Áðrenn 30. januar 2006

TEAM85

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

# Leys størv



## Býlingshúsið á Ternuryggi søkir eftir:

- einum pedagogi til barnagarðsstovuna Sóljuna at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. mars 2006 ella eftir nærri avtalu.
- einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna á vøggustovustovuni Smæruni at byrja 1. mars 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Umsóknarfreist:** Mánadagin 30. januar 2006.

**Setanarviðurskifti:** Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

## Frítíðarskúlan Stoffalág 60 søkir eftir:

- einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. mars 2006 ella eftir nærri avtalu. Arbeiðstíðin er í høvðusheitinum millum kl. 11.00 og 17.00.

**Umsóknarfreist:** Mánadagin 13. februar 2006.

**Setanarviðurskifti:** Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Les meira um størvini á www.torshavn.fo/leysstorv**

www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni